gult cyan magenta svart

Føroyingur vi› á »elefantvei›u« á Fyllabanka:

Stórur spenningur í Grønlandi nú oljuleiting er byrja›

Ey›finn Jacobsen vildi royna naka› n‡tt og søkti starvi› sum fyrisitingarstjóri í grønlendsku ráevnisumsitingini. Hann fekk starvi› framum a›rar 30 umsøkjarar. Nú fylgir hann so tí fyrstu boringini – um somu tí› sum hann eisini fylgir vi›, hvat hendir í Føroyum á oljuøkinum

JAN MÜLLER

Tann 10. juli kann gerast ein søguligur dagur í grønlendskari vinnusøgu. Henda dagin var› sett á at bora eftir olju og gassi á Fullabanka í Vesturgrønlandi. Millum tey mongu fólkini, sum eru vi› í hesum spennandi arbei›i, eru eisini føroyingar, og ein teirra er Ey›finn Jacobsen úr Sørvági. Hann hevur til n‡liga starvast sum sakførari í Havn og seinastu tí›ina, á›renn hann fór til Grønlands, arbeiddi hann í Fíggjarmálast‡rinum vi› nettup oljumálum.

Ey›finn Jacobsen vildi royna naka› n‡tt og søkti starvi› sum fyrisitingarstjóri í grønlendsku ráevnisumsitingini. Hann fekk starvi› framum a›rar 30 umsøkjarar.

Nú fylgir hann so tí fyrstu boringini – um somu tí› sum hann eisini fylgir vi›, hvat hendir í Føroyum á oljuøkinum. – Eg hev›i ikki ímynda› mær, at hetta fór at vera eitt so avbjó›andi og spennandi arbei›i, og tann sannroynd, at bæ›i grønlendingar og føroyingar eru farnir at leita eftir olju og gassi um naka› somu tí› - ger hetta ikki minni áhugaverd sigur Ey›finn Jacobsen, sum er vi› at fáa fast undir fótum í Nuuk. Í summar fer restin av familjuni til Grønlands.

Ey›finn grei›ir frá, at ta› hevur gingi› vi› vi› boringini og vóru teir komnir einar 500 metrar ni›ur sí›st í farnu viku. Ætlanin er at bora í gó›an hálvan annan mána›.

Talan er um eina rættiliga áhugaverda verkætlan, sum tey f‡ra oljufeløgini, Statoil, Phillips, Dong og Nunaoil standa fyri. Til sjálva boringina ver›ur brúkt spildurn‡ggja og sera vælútgjørda norska boriskipi› West Navion. Skipi› er útgjørt vi› øllum hugsandi hentleikum. Saman vi› tí eru eisini tveir stórir supplybátar.

Alt grønlendska samfelagi› fylgir boringini vi› stórum áhuga. – Eg haldi ikki eg sigi ov nógv, tá eg sigi, at stór semja er í Grønlandi fyri at troyta ráevni í undirgrundini, ta› veri› seg olja, gass, mineralir o.a. Men sjálvandi leggja teir stóran dent á – eins og í Føroyum – at umhvørvi› ikki ver›ur dálka›, og er hetta kanska serstakliga t‡dningarmiki› í tí sera vi›kvæma arktiska økinum.

Ey›finn Jacobsen sigur, at umframt oljufeløgini, sum hava fingi› tilluta› uppgávuna at gera hesa fyrstu boringina, so fáa teir stóra hjálp frá ymsum donskum myndugleikum so sum GEUS, Dansk Miljøundersøgelsen og Energistyrelsen.

Eins og í Føroyum ver›ur nógv tosa› um at fáa samfelagnum enn eitt bein at standa á, solei›is at ikki alt stendur og fellur vi› fiskivinnuni.

Sambart avtaluni millum heimast‡ri› og donsku stjórnina er øll umsitingin av ráevnunum flutt til Nuuk, og ta› er her leikluturin hjá m.a Ey›finn Jacobsen liggur. Avtalan sigur so eisini, at av teimum fyrstu 500 mill. kr., sum koma frá møguligari olju, skal b‡tast helvt um helvt millum Grønland og Danmark, me›an inntøkur oman á hesa upphædd skulu samrá›ingar vera um. Sambært avtaluni hava grønlendingar eisini møguleika at brúka danska ekspertisu.



Møguliga ver›ur ta› eisini boriskipi›, West Navion, sum fer at bora vi› Føroyar fyri Statoil og Phillips

Mest sannlíkt at finna gass

Hvussu stórir eru so møguleikarnir fyri at finna naka› í undirgrundini? – Gjørt er stórt forarbei›i og er talan um stórar strukturar, sum kunnu goyma olju og gass. Mett ver›ur, at møguleikin fyri at finna olju tó bert er eini 2-4%, me›an útlitini fyri gassfundi eru 50%. Og ver›ur talan um gassfund, so ver›ur tosa› um elefantar tvs. risastór felt.

Ey›finnur Jacobsen sigur, at teir í Grønlandi fylgja eisini vi› í tí, sum hendir á føroyska oljuøkinum. Í løtuni arbei›ir hann vi› at leggja til rættis 1. útbjó›ingina í Grønlandi. Hon ver›ur l‡st eftir at úrsliti fyriliggur frá hesi fyrstu boringini.

Annars fer stórur partur av arbei›inum eisini til námsvinnuna, sum tykist hava stóra framtí› í Grønlandi. Í næsta ár ver›ur eitt gullnám lati› upp í Grønlandi.

Sosialurin skilur annars, at møguleiki er fyri, at hetta sama boriskipi›, sum nú ver›ur brúkt í Grønlandi, kann koma at bora fyri Statoil-bólkin í Føroyum eisini. Ta› hava vit tó ikki fingi› vátta›, men ta› skilst, at hetta er ikki óhugsandi.

gult cyan magenta svart

Starvsfólkini rýma av Cafe Natúr

Meginparturin av starvsfólkunum á Cafe Natúr í Havn, fara ikki aftur til arbeiðis, eftir at ein starvsfólkafundur gjáramorgunin endaði við, at flestu teirra søgdu seg úr starvi

Meginparutin av starvsfólkunum á Café Natúr søgdu seg gjáramorguni úr starvi vegna vánalig lønarviðurskifti

RÚNAR REISTRUP

Gjármorgunin søgdu flestu starvsfólkini á Cafe Natúr í Havn seg úr starvi vegna lønarósemju. Sosialurin skilir, at ósemja leingi hevur verið millum starvsfólk og leiðslu á Cafe Natúr um lønarviðurskiftini, og gjáramorgunin avgjørdi meginparturin av teimum so at siga seg úr starvi.

Sambært Turid Samró, stjóra á Cafe Natúr, er talan um at átta starvsfólk hava sagt seg úr starvi vegna ósemju um løn fyri arbeiði ólavsøkudagarnar.

- Tey settu fram eitt lønarkrav fyri ólavsøkudagarnar, sum vit als ikki kundu góðtaka, og boðaðu frá, at varð kravið ikki gingið á møti, so søgdu tey seg úr starvi.

Ikki nøgd við 60 krónur um tíman

Niklas Winhter, ið er ein av teimum, ið gjáramorgunin gjørdist fyrrverandi starvsfólk á Cafe Natúr, sigur, at talan ikki var um at starvsfólkini settu fram eitt ultimatum, sum stjórin annars vil vera við, og at talan ikki er um átta, men tólv ella trettan fólk, ið gjáramorgunin góvust at arbeiða á Cafe Natúr.

- Vit søgdu sum var, at vit hildu at lønin, ið Cafe Natúr ætlaði at lata okkum fyri arbeiðið ólavsøkudagarnar, var ov lág, tá havt verður í huga hvørjar merkisdagar talan er um, og hvussu stórt arbeiðstrýstið er teir dagarnar, sigur Niklas Winther. Hann upplýsir, at vanliga liggur tímalønin hjá starvsfólkunum millum 60 og 80 krónur, alt eftir hvussu leingi tey hava verið í starvi og hvørjar uppgávur tey røkja. Uppleggið hjá Cafe Natúr var sambært Niklasi Winther, at hesir lønarsatsir eisini skuldi galda 28. og 29. juli.

- Tað hildu vit vera ov lítið, og tí løgdu vit eitt skrivligt lønaruppskot fram, har vit skutu upp, at lønin skuldi vera 120 krónur um tíman báðar ólavsøkudagarnar.

Hetta hendi á starvsfólkafundi gjáramorgunin. Sambært Niklasi, tók stjórin á Cafe Natúr hetta sum eina hóttan, og boðaði frá, at tey, ið vóru ónøgd við lønartreytirnar, kundu fara og ikki koma aftur.

- Vit hava fingið ringa viðferð og valdu tí at fara, sigur Niklas, og leggur afturat, at tað er óhugsandi, at tey aftur fara at arbeiða á Cafe Natúr.

Søktu beinanvegin eftir fleiri

Longu fyrrapartin í gár søkti Cafe Natúr eftir nýggjum starvsfólkum í eini útvarpslýsing, og sambært stjóranum, vóru teir fyrstu nýggju umsøkjararnir longu farnir at ringja inn um middagsleitið í gjár.

Turid Samró sigur, at av tí at Cafe Natúr hevur opið mestsum hvønn dag í árinum - harímillum alla ólavsøkuna - so vilja tey ikki geva fólki meira í løn, tá arbeitt verður serligar dagar. Í gjár var Cafe Natúr opin, og sambært stjóranum, fer cafein at koyra víðari sum vanligt, hóast meginparturin av starvfólkunum hava valt at venda henni bakið.

- Vit eru nøkur fólk eftir, og eg vænti, at fleiri nýggj fólk fara at koma til arbeiðis um heilt stutta tíð, so hetta kemur ikki at ávirka arbeiðið í sjálvari cafeini, sigur Turid Samró, stjóri á Cafe Natúr.

Minningarorð yvir Arnbjørn Randrup Thomsen

Dátt komu boðini við, tá sonur Arnbjørn ringdi og fortaldi, at Arnbjørn var deyður undir einari kaving á Sundi.

Nokk var Arnbjørn ikki ungur longur, og nokk var heilsan farin at bila, men brádligi deyði kemur altið sum eitt sjokk. Ringt er fyri okkum vinum, men hvaðna verri fyri børnini, sum tó heldigvís eru við at vera vaksin og við at kunna standa á egnum beinum.

Arnbjørn fekk ein bráðan, men góðan deyða. Tí, hvat kann vera betur deyði, enn at doyggja á sínum lívs heysti, meðan man hevur tað gott? Eitt svenskt orðatak sigur: »At doyggja tá man hevur tað gott, kann bert vera gott«.

Vit vóru barndómsvinir. Foreldrini vóru Lisa og Anker Thomsen. Heim teirra var altíð opið fyri okkum. Minnist aftur á mangar hugnaligar løtur heima hjá teimum, ikki minnst, tá mamman hevði havt bindiklubb, og vit fingu hennara fantastiska góðu »góðaráð« við fløda og syltetøj.

Sum børn nýttu vit sumrini til at læra at svimja í ánni úti í Havnardali.

Arnbjørn fekk í føðingardagsgávu frá pápanum einar svimjubrillur, og sum hann fortaldi: »Man sær eitt 10-oyra á botninum sum onki«.

Tá var lívsleiðin løgd. Føroya fyrsti froskmaður var ein veruleiki.

Barndómsárini vóru ljós og lukkulig, og fóru við kaving á sjónum í svimjibuksum og føroyskari troyggju. Líka frá fyrst í apríl til síðst oktober, ja faktisk árið runt, um veðrið var gott.

Tórshavnar Froskmannafelag bleiv stovnað í 1957, Froskmannatíðindi bleiv givið út, Føroyar blivu upptiknar sum sjálvstøðug tjóð í alheimsfelag fyri kavarar, og Føroyar luttóku í alheims spjótfiskikapping á cuba i 1967. Fyrsta føroyska ítróttarfelag, sum sjálvstøðugt umboðaði Føroyar í alltjóða høpi!

Alt hetta var Arnbjørn primus motor fyri, vit aðrir fylgdu bert við.

Lívið sýntist tá ljóst og lukkuligt fyri okkum allar, men so líðndi komu myrk skýggj á lívshimmalin hjá Arnbjørn og sakk í djúpan aldudal, men kláraði at kempa seg uppaftur úr lívsins brótasjógvum.

Hann fekk hereftir arbeiði á »Blákrossi« í Havn og gjørdi eitt megnar arbeiði her. Sjúklingarnir her elskaðu hann, og hann kundi ofta geva teimum vón, tí hann visti, hvat hann tosaði um. Ongin hevði verið í størri vónloysi enn hann og tó komin upp aftur.

Politiskt var Arnbjørn kommunistur um ein háls, spírin lagdur á cubaferðini í 67. Tjóðskaparliga var hann Framamaður og gløðandi loysingarmaður.

Hann hevði ein kradsan penn og var altíð fremstur á barrikadunum, men privat var hann av fittastu og blíðastu monnum og vildi aldrin nøkrum ilt.

Humor hevði hann, sum fáur og kundi altið síggja tað stuttliga í øllum, stórum sum smáum. T.d. kallaði hann kavarabussin hjá mær fyri »antabussin«,tí nummarplátan byrjaði við AN.

Fyri mær verður Havnin aldrin tann sama, nú Arnbjørn er farin.

Góðu Tórhallur, Sjúrður, Høgni og Armgarð.

Tit hava mist ein pápa, sum elskaði tykkum og vildi tykkum alt gott. Hann hevur givið tykkum nógv góð upplivilsi og minni fyri lívið.

Harrin styrki tykkum og tykkara familjum í sorgini.

Karl Johan Fossá